


**Nr. 11** ***22. mai 2022*** **82. árg.**

# Barnið og Guds ríki

Henda greinin stóð í blaðnum „Dagen“ 5. nov. 1996. Enar Burgén, prestur og trúboðari í Svenska Missionsförbundet, hevur skrivað hana. Hann var 22 ár í Kongo og Zaire:

Sambært Bíbliuni (GT) er barnið longu fyri føðingina fyri Guds skaparagerningi og menning, sí Job 10,8–12: „**Hendur tínar hava skapað meg og myndað meg.**“

Skilligari kunnu ognarrættur, skaparamegi og ábyrgd Guds ikki lýsast. Lívið hjá barninum er ein gudgivin gáva, hvørki meir ella minni!

Eitt enn djúpari sjónarmið – um gjørligt – viðvíkjandi føðing menniskjans, møta vit hjá profetinum Jesaja 49,1: „**Alt frá móðurlívi hevur Harrin kallað meg, nevnt meg at navni áður enn eg varð føddur.**“ Lukas játtar eisini sama sannleikan viðvíkjandi føðing Jóhannesar Doyparans í 1,39–45: „Í tí at ljóðið av heilsan tíni kom mær í oyru, tá spældi burðurin av frøi í móðurlívi mínum.“

Barnið livir ikki bara sítt egna lív, men tað hoyrir heilsanina hjá Mariu, sum hon ber Elisabeth, og svarar aftur við frøi! Eitt annað, kanska tað týdningarmesta, nevnir eingilin Gabriel, tá ið hann boðar frá føðing Jóhannesar (Luk. 1,15): „**Alt frá móðurlívi skal hann fyllast av heilagum anda**.“ Serliga nú á døgum er tað sera neyðugt av allari megi at leggja dent á virði og friðhalganina hjá tí ófødda barninum, nú, tá ið abortkjakið fer fram.

Eingin hevur talað týðiligari um barnsins bæði menniskjaligu og andaligu støðu enn Jesus. Í minsta lagi tvey skriftstøð vísa hetta á ein eggjandi hátt. Hitt fyrra er Mark. 10,13–18,

har Jesus í øði hevur at lærusveinunum, av tí at teir vilja forða nøkrum mammum at føra børnini til Jesusar, so hann kann vælsigna tey. Við einum – fyri Jesus – næstan ótrúliga dømandi orðavali, tekur Jesus til orða í Matt. 18,1–10, har 6. versið man vera tey harðastu orðini í NT: „**Men tann, ið er ein meinbogi fyri einum av hesum smáu, ið trúgva á meg, honum var tað betri, at ein mylnusteinur var hongdur um hálsin á honum, og hann var søktur niður í djúpa havið**.“ Tað harmar okkum almikið, at vit verða noydd at sanna, at Jesu orð um, hvat ið eitt barn er vert, og orð hansara um dómin yvir tann, sum forførir eitt barn, sjáldan verða nevnd í dagsins kjaki um barnaporno, og hvussu hetta hevur breitt seg út um allan heimin í dag.

Hóast Jesus sjálvur hevur sagt, at børnini eru hin einasti mannabólkurin, sum uttan avmarkingar hoyrir Guds ríki til, við øllum tí sum tað inniber, so eru børnini kortini hin mest árendi bólkurin, verjuleysur og illa viðfarin, í hesum ónda heimi. Børn í túsundatali doyggja í hungri dagliga, onnur í hópatali liva sum flóttafólk í svongd, sjúkum, fátækdómi, fyri ikki at nevna tey túsundir, sum verða noydd at gera tung og strevin arbeiði fyri bara so dánt at ana.

*LMF-blaðið. – Effie Campbell* umsetti.

# Eini himmalsk ráð

Børge Wellejus greiddi einaferð frá, hvussu hann fekk eini himmalsk ráð:

Eftir at hava sitið á skrivstovu í 16 ár, fekk eg gjøgnum ein kristnan bróður, sum var heilsølumaður og seldi sjokulátu, bomm og karamellur, tilboð at gerast umboðsmaður fyri vørur hansara í Danmark.

Eg segði ja uttan at hugsa um, hvussu øgiligur munurin er at sita á skrivstovu og at fara út millum viðskiftafólkið um alt landið.

Fyrsti dagurin var ein sonn royndarstund. Eg fekk ongar bíleggingar og stóð við hattinum í hondini beint innan fyri handilsdyrnar og umbar nærum, at eg var til.

Á hotellinum um kvøldið, eftir ein fullkomiliga miseydnaðan dag, útoysti eg mítt pínda hjarta fyri Harranum og segði: „Eg dugi ikki at gera hetta. Miskunna mær!“

Tá ljóðaði ein still rødd í mínum hjarta: **„Tú skalt koma sum ein, ið ger teimum eina tænastu!“**

Eg takkaði Gudi fyri hesi ráðini og gjørdi av at royna tey komandi dag. Og undrið hendi av sonnum. Eg fekk ein heilt annan verumáta og gav viðskiftafólkunum ta áskoðan, at tey kundu ikki vera vørur mínar fyri uttan, og eg fekk eisini nógvar bíleggingar næstan í hvørjum staði.

Ofta havi eg hugsað um hesi himmalsku ráðini, og eg havi „gróðursett“ tey í mínum evangeliska virki.

Kanska kundi tú, sum lesur hetta, eisini fingið eitt skump gjøgnum hesi himmalsku ráð og blivið frímóðigari í tínum verumáta sum ein kristin, tí eisini í hesum føri er tað satt, at vit koma fyri at gera menniskjum eina tænastu, so tey kunnu fáa lut í og uppliva ta undurfullu frelsuna í Jesusi Kristi. Vit hava besta boðskap at bera.

*„Kirkeklokken“ – Effie Campbell* umsetti.

# Jesus er ein persónlig gáva til tín

*David Åleskjær*

Royn at lesa Jóhannesar evangeliið, sum vart tú hin fyrsti í verðini, sum las tað. Být altíð um orðini „tit“, „tykkum“ og „tykkara“ í 14., 15., 16. og 17. kapitli við egna navn títt, og les tað sum eitt persónligt bræv frá tínum Skapara.

Tað er ein ófatilig gáva frá Gudi, sum bíðar tær. Lat ikki alt tað, sum menniskju surra uttan um gávuna – bløðruplast og litfagurt pappír – ræða teg.

Pakka upp og hygg at gávuni! Hon er sanniliga verd at liva fyri!!

Kanska ert tú vorðin vónsvikin av teimum trúgvandi, tey hava goymt Jesus fyri tær. Far til sjálvan orginalin, far til Jesus. Um ein køka smakkar illa, so nýtist einki at bila uppskriftini. Tað kunnu vera kokkarnir, sum hava mistikið seg.

*Effie Campbell* umsetti.

# Landið eitur Ísrael

Í Jeremia 16,14–15 gevur Harrin hetta lyftið: „Sí, tí skulu dagar koma, sigur Harrin, at tað ikki meira skal verða sagt: So satt sum Harrin livir, ið leiddi Ísraelsmenn út úr Egyptalandi!

– men: So satt sum Harrin livir, ið leiddi Ísraelsmenn út úr norðurlandinum og úr øllum teimum londum, hagar sum hann hevði rikið teir. Og eg man flyta teir heim aftur Í LAND TEIRRA, SUM EG GAV FEDRUM TEIRRA.“

Útferðin út úr Egyptalandi var STÓR. Útferðin úr mongu tjóðunum í heiminum er STØRRI. Guds fólk eru jødarnir. Forfedrar teirra eru Ábraham, Ísak og Jákup. **Sambært Gudi eitur landið Ísrael – ongantíð Palestina. Hatta navnið hevur ein antikristin keisari, Hadrian, funnið uppá í ár 132, fyri at eyðmýkja jødarnar**.

Ábrahams, Ísaks og Jákups Gud verður brúkt bæði í Gamla og Nýggja Testamenti. Muslimar eru eisini eftirkomarar Ábrahams, men gjøgnum Ísmael. Tað eru bara jødar, sum eru eftirkomarar Ábrahams, Ísaks og Jákups.

*Effie Campbell* umsetti.

# Sannleikin um Ísrael

Jødar hava búð í 4.000 ár í Ísrael, og palestinensar hava bara búð har í 400 ár.

600 ferðir er Jerusalem nevndur í Bíbliuni. Hann er ongantíð nevndur í Koranini. Muhammed sjálvur var ongantíð har.

Einaferð áttu turkar Ísrael. Jødarnir skuldu rinda skatt til Turkalands. Skatturin skuldi rindast í trøum. Tá ið trøini vóru horvin, bleiv alt eitt stórt mýridíki. Jødar doyðu sum flugur, tá ið teir bygdu Jerusalem uppaftur.

Tað eru 700 lyfti um heimkomu jødanna. 70–80% eru gingin út. Tað eru 15 mill. Jødar í heiminum, bara 7 mill. búgva í Ísrael í dag.

Tað eru 4 eyðkenni fyri eina tjóð: økið, tungumál, søga og mentan. Palestinensar tosa arabiskt. Teirra øki er inni í Jordan, har búgva 80% av teimum. Teir eru sostatt ikki eitt etniskt fólkaslag. Tað er ein medialygn. Teir gevast ikki, fyrr enn teir hava tveitt jødarnar út í Miðalhavið, tí jødar eru ein tornur í teirra eyga.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 22. mai | **Tekstur:** | Jóh. 13,1-17 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 13,15 |
| 29. mai | **Tekstur:** | Áps. 1,6-11 | **Bíbliuorð:** | Áps. 1,8b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 12** ***5. juni 2022*** **82. árg.**

# Sjeyfalt endurgjald

Nú ein dagin, tá ið eg hevði eina stilla løtu, varð eg mintur á orðið í Orðtøkunum 6,31: „Verður hann (tjóvurin) tikin, má hann sjeyfalt gjalda, alt, ið hann eigur í húsi sínum, má hann lata.“ Og so sá eg hetta lyftið fyri mær í einum størri høpi.

Her er talan um ein tjóv, og skrivað stendur: „Verður hann tikin, má hann sjeyfalt gjalda.“ Tankar mínir leita til tær familjur, har bara ein ella fá eru frelst. Eg síggi eina vellandi vón í hesum lyfti: Tjóvurin verður noyddur at endurgjalda stuldurin sjeyfalt, tá ið hann verður tikin. Hvør er størsti tjóvurin? Tað er Satan. Jesus umtalar hann í Jóh. 10,10 sum tann, sum stjelur, drepur og oyðir.

Í Áps. 16,30–31 fær rómverski fangavaktarin eitt frelsulyfti, tá ið hann spyr: „**Hvat skal eg gera, fyri at eg kann verða frelstur?“ Paulus svarar: „Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt**!“ (v.31). Sjálvt um tú ert hin einasti í ætt tíni, sum ert frelstur, miss so ikki mótið og gloym ikki lyftið: „Tú og hús títt skulu blíva frelst!“

Uttan mun til hvussu mong í familjuni Satan hevur blindað, minst so til einkjuna í Luk. 18, sum Jesus rósar, av tí at hon var so áhaldandi mótvegis tí órættvísa dómaranum. Hon kravdi sín rætt – og hon fekk hann. Latið okkum krevja okkara rætt viðvíkjandi slekt okkara. Satan er ein tjóvur, men Jesus hevur sigrað á honum. Hann ýlir sum ein leyva fyri at ræða og lamma okkum – men hann er tannleysur.

Latið okkum krevja okkara guddómliga rætt: „Eg og hús mítt skulu blíva frelst! – Tí skalt tú Satan, tú listilærdi tjóvur

– gjalda sjeyfalt aftur – í Jesu navni!“ Sjeyfalt kann gerast til eina rúgvu. Lat Gudi hatta roknistykkið upp í hendur. Tín og mín lutur er at standa í trúgv fyri slekt okkara og vænta, at øll slektin verður frelst – uttan mun til hvussu hugtyngjandi og neiligt tað tykist at vera beint nú.

Sjeyfalt endurgjald! Tað er Guds revsingaráseting fyri ein tjóv – eisini fyri tann størsta av øllum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eitt lærusveinalív

*Anne Christiansen*

Í Áps. 11,26 lesa vit, at í Antiokiu vórðu lærusveinarnir fyrst kallaðir kristnir. Tað vóru ikki teir, sum kallaðu seg sjálvar kristnar, men tað vóru onnur, sum góvu teimum hetta navnið, tí teir mintu so nógv um Kristus. Vilja onnur menniskju verða mint á Kristus, tá ið tey síggja okkum? Jesus segði: „Farið tí og gerið øll fólkasløgini **til lærusveinar mínar**… við tað at tit **læra tey** at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum.“ Matt. 28,19–20. Vit kalla okkum kristin, men veruleikin er tann, at vit mugu aftur fara at gerast ein Jesu lærusveinur.

Tað var so dragandi og dámligt at gerast ein Jesu lærusveinur. Jesus segði bara: „Fylgið mær!“ og so reistust teir og fóru frá sínum arbeiði, tollbúðini, gørnunum o.s.fr. Tá ið vit verða kallað til eitt lærusveinalív, so er tað í øllum samanhangum, at vit skulu liva sum ein Kristi eftirfylgjari. Vit bera tað við okkum allastaðni, har vit eru, tað skal merkja alt, vit gera, og tað er við til at broyta samfelagið. Vilja vit broyting í landinum, mugu vit byrja við okkum sjálvum.

Vit mugu biðja: „Harri, eg boyggi meg fyri tær. Tak meg aftur til eitt lærusveinalív.“ Tað merkir, at har, sum Hann er, skal eg vera. Har Hann fer, skal eg fara, so sum Hann livdi, skal eg liva. Eg skal fylgja hansara fyridømi í øllum lutum. Fyri at gera tað mugu vit doyggja frá okkum sjálvum og reisast upp til eitt nýtt lív. Tað er ikki møguligt í egnari megi. Vit mugu vera fødd av nýggjum.

Vit eru ikki betri enn onnur, tí vit eru øll í læru. Vit eru brøður og systrar. Í Luk. 18,9 sigur Jesus eitt líknilsi við nakrar, sum litu á seg sjálvar, at teir vóru rættvísir, og roknaðu hinar fyri einki. Tú hevur verið lærusveinur (kristin) so leingi, og so

kemur ein annar inn og tekur tín sess, og tú hugsar: „Hvat í víðu verð…“ Og tá ið tú stendur uppi við talarastólin, so sært tú, at ein bólkur, sum heldur saman, situr høgrumegin í salinum, meðan ein annar bólkur situr vinstrumegin. Teir tosa ongantíð saman og hava ongan felagsskap. Tað er ikki rætt. Vit eru brøður og systrar og skulu laga okkum eftir hvørjum øðrum, tí vit eru lærusveinar.

Vit mugu taka krossin upp dagliga og fylgja Jesusi í øllum, eisini í hjúnalagnum, fyri at vit skulu vera „happy“, men eisini „holy“, hjúnalagið skal brýna okkum. Tann, sum missir lív sítt, skal bjarga tí. Um vit av og á geva eftir og lata hin partin fáa sín vilja (missa lív okkara), so fáa vit tað aftur fleirfalt. Vita bara!

Í Luk. 14,33 sigur Jesus nakað løgið: „Somuleiðis kann heldur eingin tykkara, sum ikki avsigur alt tað, ið hann eigur, vera lærusveinur mín.“ Ha? Nei, bíða nú!!! Tað er soleiðis við Skriftini, at skriftstað tolkar skriftstað. Her meinast tað við, at vit skulu ikki vera bundin av tí, vit eiga. Hjartað skal ikki verða har. Her greiðir Jesus gjøllari frá tí: „Tann, sum á tí degi er staddur uppi á tekjuni og hevur amboð síni inni í húsinum, hann fari ikki oman eftir teimum, og somuleiðis vendi tann, sum er úti á markini, ikki heim aftur.“ Hetta er uttan mun til, um vit eru ovurrík ella fátæk sum kirkjurottan, so skulu vit ikki vera bundin av ognarlutunum. Teimum mugu vit undir øllum umstøðum sleppa, tá ið vit verða rykt burtur.

Og so kemur ávaringin: „Minnist til konu Lots.“ (v. 32). Hon vendi sær á fyri at síggja alt tað, sum hon mátti sleppa. Hon var bundin av ognarlutunum og bleiv til ein saltstólpa. Hon hevði fingið ávaringina frammanundan, men vildi ikki lurta.

*Effie Campbell.*

# Halgan – heilaggerðing

*Emanuel Minos*

Ungdómar koma til mín og spyrja: „Hvat er heilaggerðing (halgan)?“ Halgan er ikki teologi, hon er ikki ein lærusetningur, men hon er lívið, sum vit liva saman við Gudi í gerandisdegnum.

„Tí at hetta er Guds vilji, **halgan** tykkara, at tit halda tykkum frá ólevnaði, at ein og hvør av tykkum veit at vinna sær sítt egna ker (sína egnu konu) í heilagskapi og heiðuri, og ikki í girndarfýsni eins og heidningar, sum ikki kenna Gud; at eingin

órættar ella svíkur bróður sín í nøkrum viðurskiftum; tí at Harrin er hevnari av øllum slíkum, soleiðis sum vit eisini áður hava sagt tykkum. Tí at ikki kallaði Gud okkum til óreinsku, men til **halganar**.“ 1. Tess. 4,3–7.

***Paulus dregur trý ting fram her:***
1. Tú skalt liva reint undan hjúnalagnum.
2. Tú skalt vera trúgvur í hjúnalagnum.
3. So skalt tú vera miskunnsamur móti medmenniskjum tínum.

Hetta er kjarnin í málinum, sum Paulus her leggur fram. Men um tú ikki hevur hildið hetta, so hava vit eitt blóð, sum reinsar frá allari synd, og tú kanst í dag byrja á halganarvegnum, uttan mun til fortíð tína. Gud havi lov fyri kraftina í blóðinum. Vit eru ikki rættvísgjørd við egnari góðsku, men av tí náði, sum Jesus gav okkum á Golgata.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Nógvir ungdómar stríðast sálarliga. Hugsa tær, um teir vistu, hvørjir teir eru, og hvørjar stórar tankar, ið Gud hugsar um teir. Tað er nakað, sum er rænt frá teimum. Í Jeremia 1,5 stendur, at áðrenn Hann myndaði okkum í búkinum á mammu okkara, kendi Hann okkum.

*e.c.* ums.

---

Tað eru vit, sum avmarka Guds ríki her á jørð. Nútíðar kristin hava ábyrgd fyri nútíðar heidningum. So langt, sum vit náa út við evangeliinum, so langt nær Guds ríki út. Hugsa um hatta!

*„De venter“ Asbjørn Aavik – e.c.* ums.

---

Jesus satsar upp á fótfólkið og hevur givið okkum boð um at gera øll fólkasløg til hansara lærusveinar.

*e.c. ums.*

---



# SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum eina gleðiliga hvítusunnu***

***Heilsan blaðstjórin.***



## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5. juni | **Tekstur:** | Jóh. 16,5-15 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 16,13a |
| 12. juni | **Tekstur:** | Mark 12,41-44 | **Bíbliuorð:** | Luk. 6,38a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74